# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Lóggeva um rokningar?

Viðhvørt verður farið ov langt í lóggávu. Um ein vøra verður keypt onkustaðni frá, so tryggjar man sær í viðskiftatreytum, hvussu farast skal fram við gjaldi, levering o.ø. Tað sømir seg ikki at fara at lóggeva um, hvussu fakturering skal fara fram. Heldur ikki, um man eitur almennu Føroyar.

Nú er tað soleiðis, at almennu Føroyar hava Búskaparskipan Landsins. Eingin fær at vita, hvat henda skipan hevur kostað, men óivað er skipanin so snild, at tað burdi verið lagamanni hjá Fíggjarmálaraðnum at tosað øll til rættis viðvíkjandi fyrimunum, og tá tað kemur til, hvussu fakturering skal fara fram.

At leggja um til elektroniska fakturering eigur at henda, tí at allir partar síggja tað snilda í hesum, og ikki tí at tey vera bukað uppá pláss við einari lóg.

Lóggáva skal ikki brúkast til at trýsta ávís sløg av umsiting niðurum oyrini á fólki. Um Búskaparskipan Landsins ikki kann implementerast, uttan at lóggáva skal til hjálpar, so er hon ikki nóg góð. Um Fíggjarmálaráðið ikki klárar at sannføra stovnar og onnur um, at elektronisk fakturering er vegurin fram, uttan at kunna hótta við lógarbroti, so er ráðið ikki sína uppgávu vaksið.

Eitt er at senda eina rokning til ein skúla ella landsstovn og so verða biðin um at rætta hana, tí hon ikki hevur rættan tekst. Eitt heilt annað er at fáa at vita, at man fremur lógabrot við ikki at fylgja einari ávísari mannagongd, sum best kann karakteriserast sum reint administrativ.

At Føroya Løgting skal lóggeva rokningar til at passa til eitt ávíst KT format er skeivt. Eitt ávíst KT format, uttan mun til hvussu gott ella snilt, verður skjótt ótíðarhóskandi sum øll onnur KT format á marknaðinum.

Eisini vil ein slík lóggáva merkja, at allir stovnar og grunnar – sum annars burdu verið undantiknir, um teir ynsktu tað - verða bundnir tættari at Búskaparstýring Landsins og mugu helst gjalda meiri til hesa skipan. Ein skipan, har almenningurin ikki veit, hvussu nógv hon hevur kostað og kemur at kosta framyvir.

Tað kann væl vera, at elektronisk fakturering er vegurin fram, men tað er ikki rætt í Føroyum at gera sum í Danmark, og lóggeva um tað. Fíggjarmálaráðið má læra seg kunstin at hava ein dialog við stovnar, grunnar og tað privata, heldur enn bert at kopiera danska lóggávu,

Megnar Fíggjarmálaráðið ikki at selja seg sjálvt og sínar mannagongdir, so er loysnin ein øðrvísi framferðarháttur og kanska eitt sindur meiri av eyðmjúkheit yvirfyri kundunum hjá sær, heldur enn at órógva tingið við at royna at gera umsitingarligar mannagongdir til lóggávu.

Tað má ikki henda, at eitt ráð uttan nakað sleppur at buka fólk í høvdið við lóg, ístaðin fyri at skula argumentera fyri tað snilda í sínum loysnum. Viðhvørt eiga politikarar at noyða embætisverkið at umhugsa eina tillagan til samfelagið rundanum, heldur enn altíð at loyva teimum at forútseta tað øvugta. Vónandi fellir tingið lógaruppskotið um elektroniskar rokningar av tí grund.

**Sosialurin**

## Allar deildir hava spart

**GUNVÁ VIÐ KELDU**
borgarstjóri í Klaksvík



**Alment kjak millum politikarar um politisk mál er upp á sítt pláss, men sum borgarstjóri kann eg undir ongum umstøðum góðtaka, at fyrrverandi varaborgarstjóri og núverandi býráðslimur gevur almenninginum ósannar upplýsingar um, at Tekniska Deild í ár hevur fingið økta játtan, meðan aðrar deildir hava spart**

Vit fólkavaldu eru kosin av veljarunum at stýra kommununi og at taka ábyrgd av teimum gerðum og avgerðum, sum tiknar verða. Henda uppgáva er ikki altíð líka løtt og stuttlig, men vit hava bjóðað okkum fram, og tí mugu vit eisini hava rygg til at standa við hesi ábyrgd.

Ein partur av hesi ábyrgd er at bera fram rættar upplýsingar um tær avgerðir, sum nevndir og býráð taka.

Serliga hetta seinasta er umráðandi, tí skeivir ella ógreiðir upplýsingar, sum kunnu misskiljast, kunnu fyri tað fyrsta skaða trúvirðið og álitið á kommununa, og tí at tað ið illa vil til, kunnu skeivir upplýsingar um deildir og starvsfólk hjá kommununi seta viðkomandi persónar í eina óhepna støðu.

Tað er hetta seinasta, sum Eyðgunn Samuelsen, býráðslimur, eftir míni meting, ger seg seka í, tá ið hon í almennari grein boðar frá, at (sitat byrjar) “*samgongan hevur, síðan hon tók við, uppraðfest tekniskudeild við meira enn 300 t. kr. Hetta var ikki samtykt á fíggjarætlanini, men tað eru tað pengar til. Eisini hevur samgongan niðurraðfest sosialu deild við 2 størvum, hetta var heldur ikki samtykt á fíggjarætlanini, hetta er ein sparing á meira enn 300 t.kr.*”

”*Niður við sosialu deild, upp við teknisku deild ...*” (sitat endað).

Soleiðis skrivar býráðslimurin, sum eisini er limur í fíggjarnevndini. Eisini er hon fyrrverandi 2. varaborgarstjóri, so tað er givið, at fólk rokna við, at tað er satt, sum hon ber fram í hesi almennu grein. Trupulleikin er bara tann, at hetta er ikki satt, sum Eyðgunn Samuelsen, býráðslimur, skrivar.

Tí kenni eg tað sum mína skyldu, sum borgarstjóri, at greiða nærri frá hesum viðurskiftum:

**Sparingar í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2009**

Tá ið kreppan í fjør heyst rakti kommununa so meint, gjørdi táverandi býráð av at fremja nakrar sparingar, og millum annað raktu hesar sparingar bæði Teknisku Deild og Sosialu Deild.

Í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2009 samtykti býráðið í november 2008, at Tekniska Deild skuldi skerjast við íalt 3¼ ársverkum, samstundis sum Sosiala Deild í árinum 2009 varð skerd við samanlagt 1¼ ársverki.

Nevndu skerjingar, ið vórðu samansettar av eitt nú uppsøgn, niðursettari arbeiðstíð og farloyvum, raktu báðar deildir sera meint, og sama er galdandi fyri alla býráðsumsitingina sum heild, men hetta var neyðugt vegna fíggjarstøðuna.

**Eisini Tekniska Deild hevur spart enn meira í ár**

Eftir at omanfyri nevndu sparingar vórðu samtyktar av býráðnum, valdu onkur starvsfólk sjálvi at siga seg úr starvi, og rakti hetta bæði Sosialu Deild og Teknisku Deild.

Tekniska Deild varð rakt av eyka uppsøgnum, svarandi til ¾ ársverk, og samtyktu avvarðandi nevndir í januar, at játta ½ ársverk innaftur á deildina.

Sostatt hevur Tekniska Deild síðani ársskiftið, tá ið nýggja býráðið tók við, mist umleið ¼ ársverk afturat teimum 3¼ ársverkunum, sum býráðið samtykti áðrenn ársskiftið.

Tað er tí beinleiðis skeivt, sum Eyðgunn Samuelsen, býráðslimur, førir fram, at deildin hevur fingið eina eykajáttan á 300 tkr. í ár. Tvørturímóti hevur deildin spart enn meira, sum eisini er neyðugt í løtuni, soleiðis sum tær fíggjarligu umstøðurnar eru.

Samanlagt hevur Tekniska Deild sostatt mist 3½ ársverk, sum er ein stór skerjing, ið merkist.

**Sosiala Deild eisini skerd enn meira í ár**

Aftaná samtyktu sparingarnar í desember varð Sosiala Deild rakt av uppsøgnum, svarandi til uml. ¾ ársverk í 2009. Hesar uppsagnir fáa fullan virknað í 2010, svarandi til 1½ ársverk. Afturat hesum kemur so tað ½ ársverkið, sum varð samtykt av gamla býráðnum, ella samanlagt 2 ársverk.

Hetta málið varð lagt fyri avvarðandi nevndir eftir ársskiftið, og hevur býráðið nú samtykt, at Sosiala Deild fær 1 ársverk, m.a. við at flyta arbeiðsorku innanhýsis millum verandi starvsfólk hjá kommununi. Haraftrat verða arbeiðsuppgávur hjá deildini fluttar til onnur starvsfólk í býráðsumsitingini at røkja. Samanlagt svarar hetta til umleið 1¼ ársverk, sum býráðið nú hevur samtykt at játta deildini fyribils.

Sostatt er Sosiala Deild í løtuni, samanlagt skerd við umleið ¾ ársverkum, og kemur hetta sera illa við hjá deildini, havandi í huga, at Sosiala Deild framman undan sparingunum var væl minni enn Tekniska Deild, og sparingar merkjast og raka tí lutfalsliga harðari.

Men sum nevnt eru hesar skerjingar neyðugar at gera, nú fíggjarligu umstøðurnar eru so nógv versnaðar.

Tað er tí heldur ikki satt, sum Eyðgunn Samuelsen, býráðslimur, førir fram, at samgongan hevur niðurraðfest Sosialu Deild við 2 størvum.

Sum borgarstjóri eri eg ógvuliga hørm um hesa óhepnu og óneyvu útmeldingar frá býráðsliminum, og skrivi eg tí hesa drúgvu rættleiðing fyri at forða fyri, at starvsfólk, sum ikki fáa vart seg, soleiðis yvir fyri almenninginum verða sett í ein sera óhepna støðu.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.